# Blé vil á landsliðið



Seinastu árini hevur nógv verið kjakast um at fáa útlendingar í føroyskum fótbólti á landsliðið. Serliga Alex José Dos Santos og Sorin Anghel hava gjørt vart við sín áhuga. Og nú vil ein fílabeinsstrandingur eisini fegin sleppa í føroyska landsliðsbúnan. Evrard Blé sigur við heimasíðuna hjá AB, at hann væl kundi hugsa sær at spælt fyri landsliðið. Har hevði hann muna væl, heldur hann. Miðvallarin, sum av fyrstan tíð kom til Føroya í 2005, hevur ikki føroyskan ríkisborgaraskap, og tað er heldur ikki gjørligt soleiðis uttan víðari.

# Silkeborg tapti grannauppgerð

Silkeborg vitjaðu grannarnar úr Viborg í dag. Liðið hjá Christian Lamhauge Holst byrjaði sum eitt óløgið. Rajko Letic legði Silkeborg á odda 1-0 tá eitt korter var farið, og í 36. minutti økti sami Letic til 2-0. Beint áðrenn hálvleik minkaði Lasse Kryger hjá Viborg um munin til hálvleiksstøðuna 1-2 til Silkeborg. Silkeborg hevði leiðsluna langt inn í 2. hálvleik, men tá 2. hálvleikur varð eitt sindur meir enn hálvliðin vendi Viborg dystinum uppá 5 minuttir. Fyrst javnaði Christian Olsen til 2-2, og beint aftaná skoraði fyrrverandi Brøndby-spælarin, Dan Anton Johansen sigursmálið til 3-2 til Viborg. Ì eini roynd at venda dystinum setti Silkeborg føroyska landsliðsspælaran, Christian L. Holst á vøllin í 76. minutti, men tað vendi so ikki úrslitinum, og varð endin, at Viborg vann 3-2. Føroyski landsliðsvenjarin, Jógvan Martin Olsen kann kortini fegnast um, at Christian L. Holst verður tøkur aftur, aftaná fráveru orsaka av skaða.

## Málið mest sum rokkið

**Lættin er stórur á Toftum, nú tað er greit, at talan eisini verður um sunnudagsfótbólt á Svangaskarði komandi kappingarár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Jann Ingi Petersen, sum aftur hesa ferð var sjónligur á sentrala miðvøllinum hjá B68, helt eftir dystin sunnudagin, at nú hevur B68 vissað sær sæti í Formula-deildini komandi kappingarár.

- Tað skal í øllum førum vilja serstakliga illa til, um tað ikki skal ganga nú. So skulu vit bara tapa, meðan alt skal fella øgiliga væl hjá liðunum undir okkum.

Merkir tað eisini, at tit nú fara at líta longur upp á stigatalvuna?

- Bæði og. Vit royna sjálvandi at fáa stig í teimum dystum, sum vit fara inn til, men munurin uppeftir er tó nakað stórur. Men á pappírinum hava vit góðan møguleika næstu dystirnar, har vit spæla móti Skála, ÍF, B71 og KÍ. So gera vit okkara skyldu, samstundis sum hini halda á fram at missa stig, sum tey hava gjørt, so kunnu vit kanska koma heilt nær. Tað vildi sjálvandi verið stuttligt, men tað er nú ikki tað, sum vit hava størst fokus á. Málið hevur alla tíðina verið at bjarga Formula-sessinum, og tað hava vit helst gjørt nú, segði Jann Ingi Petersen.

**-mørk**

B68-HB 2-1 (0-0):

# B68 er bjargað

**HB hevði aloftast trýstið, men tað var B68, sum streyk avstað við sigrinum, soleiðis at teir nú eru púrasta tryggir Formula-deildini**

*B68*

*HB*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

B68 spælir eisini Formulabólt næsta kappingarár. Øðrvísi fær niðurstøðan illa verið, eftir at teir í gjár vunnu 2-1 á HB.

Uppskriftin var í mangar mátar tann sama, sum hevur tryggjað toftamonnum so nógv stig í seinastuni. Frá byrjan legði B68 dent á at skipa verjupartin, og so lótu teir annars HB hava bóltin nógv, uttan at havnarliðið tó megnaði at skapa teir heilt stóru møguleikarnar burtur úr hesum.

Ta einu ferðina brast eitt skot tó í stólpan handan Vlada Filipovic, men í hinum endanum hevði B68 eisini sínar møguleikar. Eitt nú bjargaði HB ta einu ferðina á málstrikuni eftir hornapark, og við fleiri aðrar deyðbóltar var eisini stórur vandi á ferð.



*Fyri tað nógva gjørdist talan um langar bóltar inn í B68-brotsteigin hjá HB. Og tað var nú langt ífrá altíð, at havnarmenninir vóru hægstir í loftdystunum*

*savnsmynd*

### Hálvkiksari setti hol á

Tað tók tó ikki vertunum meira enn lítlan minutt, áðrenn teir í seinna hálvleiki høvdu skotið seg framum. Skotið frá Dánjal Paula Højgaard var kanska meira ein hálvkiksari, enn nakað annað. Men undir øllum umstøðum um snýtti tað fullkomuliga Marcin Dawid í HB-málinum, og so kundu toftamenn í enn størri mun leggja dent á kontra-fótbóltin.

Men hóast HB framhaldandi trýsti, so gekk sera striltið við at fáa nakað burtur úr hesum trýstinum. Og spyrt tú í dag ein toftamann, so skuldi upphavið til útjavningina ongan tíð verðið dømt.

Men dómarin metti, at Ndende hevði hond á bóltinum, tá hann leyp upp inni í brotsteiginum, og so sýndi Andrew av Fløtum vanligan tryggleika, tá hann úr 11 metrum skuldi umseta brotsspark.

Tá vóru bara fýra minuttir eftir at spæla, men hetta oyðilegði kortini ikki dagin fyri B68. Bara tveir minuttir seinni var bólturin nevnliga aftur í HB-málinum. Hesa ferð var talan um hornaspark, sum Jann Ingi Petersen sendi innfyri, og har setti Brian Andresen krúllin á bóltin.

### Tryggir

Sigurin ber við sær, at B68 er tryggjað í deildini. Hóast botnurin fyri tað nógva hevur verið sera tættur, so skuldu 29 stig verið á leið tað, sum krevst til bjarging, og enn hava toftamenn eisini fimm dystir afturat at skava sær okkurt stigið saman í.

Og sum úrtøkan hevur verið seinastu umførini, so er eingin orsøk at halda, at B68 ikki fer at økja um stigatalið.

Hjá HB var talan hinvegin um ein kjaftfisk, nú teir annars veruliga tóktust hava fingið glið á. Enn eru heiðursmerkini tó væl og virðiliga sjónlig. Og mest av øllum, so eigur HB enn dystir til góðar móti øllum kappingarneytunum í sub-toppinum, og tí liggur avgerðin enn í hondunum hjá teimum.